# LANDSGRANNSKOÐANIN

## Frágreiðing

## um stjórnan av KT og KT-trygd

latin

løgtingsgrannskoðarunum

OKTOBER 2007

Traðagøta 43 ▪ Postrúm 2053 ▪ FO-165 Argir
☏ (298) 35 51 00 ▪ 🖷 (298) 35 51 01 ▪ 💻 gralands@post.olivant.fo
WWW.LG.FO

# Innihaldsyvirlit


1 INNGANGUR 5

2 VANTANDI SAMSKIPAN OG SAMSTARV UM KUNNINGARTØKNI 7

3 REGLUR UM KUNNINGARTRYGD VERÐA IKKI HILDNAR 9

4 VANTANDI YVIRSKIPAÐ EFTIRLIT 11

5 ÁVÍS FRAMSTIG ERU HEND 13

6 FYLGISKJAL 1: VISJÓN/ENDAMÁL & STRATEGI VIÐV. INFRA-STRUKTUR & SKIPANUM FYRI FELAGS KT-FYRISITINGINA 15

7 FYLGISKJAL 2. BROT ÚR ÁRSFRÁGREIÐING LATIN LØGTINGSGRANNSKOÐARUNUM 12. JANUAR 2007 23

8 FYLGISKJAL 3: HØVUÐSUPPGÁVA UM GRANNSKOÐAN AV STJÓRNAN AV KT-TRYGD Í FØROYSKU LANDSUMSITINGINI 37

# 1 Inngangur

Landsgrannskoðanin og løgtingsgrannskoðararnir hava í mong ár víst á nakrar yvirskipaðar trupulleikar í landsumsitingini, sum bert kunnu verða loystir, um samstarvað verður tvørtur um aðalráð og tvørtur um kommunala bygnaðin.

Í frágreiðing okkara til løgtingsgrannskoðararnar 12. januar 2007 umrøddu vit aftur tílík viðurskifti, m.a. vantandi stjórnan av kunningartøkni og kunningartrygd, og í hesum sambandi eisini málið um effektivisering av umsitingini.

Í uppskoti til samtyktar um at góðkenna landsroknskapin 2005, ið varð lagt fyri Løgtingið í januar 2007 (Lm. nr. 54-1/2006), høvdu løgtingsgrannskoðararnir eisini fleiri viðmerkingar, átalur og áheitanir hesum viðvíkjandi.

Endamálið við hesari frágreiðing er at kunna løgtingsgrannskoðararnar um, hvørjar broytingar eru framdar, og hvussu støðan er í dag.

Í frágreiðingini hava vit fyrst í stuttum greitt frá støðuni í dag. Vit hava valt at bólka trupulleikarnar í 3 partar:

- Vantandi samskipan og samstarv um kunningartøkni
- Reglur um KT-trygd verða ikki hildnar
- Vantandi yvirskipað eftirlit

Fyri hvønn partin hava vit greitt frá viðmerkingum okkara, og vit hava tikið við áheitanirnar frá løgtingsgrannskoðarunum í seinasta uppskoti til samtyktar. Síðani hava vit greitt frá, hvørjar viðmerkingar løgmaður og landsstýrismaðurin í vinnumálum hava til frágreiðingina.

Í **fylgiskjali 2** hava vit endurgivið viðkomandi brot úr seinastu frágreiðing okkara til løgtingsgrannskoðararnar.

**Fylgiskjal 3** er ein ritgerð um grannskoðan av stjórnan av kunningartrygd, sum tvey starvsfólk hjá Landsgrannskoðanini hava gjørt. Ritgerðin viðger og greinar gjøllari fleiri av teimum trupulleikum viðvíkjandi stjórnan av kunningartrygd í landsumsitingini, sum Landsgrannskoðanin hevur víst á í frágreiðingum sínum seinnu árini.

Landsgrannskoðanin kann taka undir við flestu av niðurstøðunum í ritgerðini, og tí hava vit valt at vísa til tær í frágreiðingini. Ritgerðin varpar ljós á nakrar grundleggjandi trupulleikar, og vónandi kann hon vera ein hjálp í royndunum at finna hóskandi yvirskipaðar loysnir á hesum trupla og torgreidda øki.

Argir, 30. oktober 2007

Leivur Harryson

## 2 Vantandi samskipan og samstarv um kunningartøkni

Flest øll lond í Evropa hava fyri fleiri árum síðani lagt miðvísar yvirskipaðar ætlanir um at gagnnýta menningina innan kunningartøkni til at effektivisera umsitingarnar (digitalisering). Í hesum sambandi verða allir tættir í umsitingunum endurskoðaðir, eisini verandi lóggáva, uppgávubýti millum land og kommunur, málsøki, stovnar o.a. Skulu møguleikarnir fyri at digitalisera og rationalisera umsitingina í størri mun verða gagnnýttir, er eisini neyðugt, at tey grundleggjandi KT-trygdarviðurskiftini eru í lagi.

Landsgrannskoðanin hevur fyri fleiri árum síðani víst á, at almenni KT-bygnaðurin kundi verið væl betri skipaður/samskipaður, men hann er í stóran mun spegilsmynd av einum undirliggjandi bygnaði. Broytingar innan lógarverkið, roknskaparverkið, uppgávubýtið millum aðalráð og stovnar, millum land og kommunur, millum landsstovnar og meira ella minni almennar grunnar o.s.fr. eru oftast farnar fram uttan nakað yvirskipað endamál.

<u>Áheitan frá løgtingsgrannskoðarunum í 2007</u>

Í seinasta uppskoti til samtyktar um at góðkenna landsroknskapin 2005 (Lm. nr. 54-1/2006), ið løgtingsgrannskoðararnir løgdu fyri Løgtingið 31. januar 2007, varð staðiliga mælt løgmanni, landsstýrismonnum og aðalstjórum til at taka hetta álvarsmál til viðgerðar.

> *”Kollveltandi broytingar eru hendar innan tøkni og samskiftismøguleikar. Skulu vit í størri mun gagnnýta stóru møguleikarnar, fyri at digitalisera og rationalisera umsitingina, er neyðugt, at tey grundleggjandi KT-trygdarviðurskiftini eru í lagi. Neyðugt er eisini at leggja yvirskipaðar ætlanir og í hesum sambandi at endurskoða bygnaðin, lóggávuna, uppgávubýtið millum land og kommunur, millum aðalráð, stovnar o.a.*
>
> *Trupulleikarnir at gagnnýta kunningartøknina og at bøta um kunningartrygdina (s. 25-26 og s. 69-79) eru tvey av fleiri dømum um, hvussu torført tað tykist vera at loysa mál, har neyðugt er at samskipa og samstarva millum fleiri aðalráð. **Løgtingsgrannskoðararnir mæla staðiliga løgmanni, landsstýrismonnum og aðalstjórum til at taka hesi álvarsmál til viðgerðar**.”*

Vísandi til frágreiðingina frá Landsgrannskoðanini, og tilmælið frá løgtingsgrannskoðarunum, bað Landsgrannskoðanin í juli 2007 løgmann og landsstýrismannin í vinnumálum um viðmerkingar.

<u>Løgmaður vísir til landsstýrismannin í vinnumálum og til eitt strategipappír</u>

Í oktober 2007 hevur løgmaður víst á, at landsstýrismaðurin í vinnumálum hevur yvirskipaðu ábyrgdina á KT-økinum í almennu fyrisitingini, og hevur tí eisini yvirskipaðu ábyrgdina av at stjórna kunningartøkni og kunningartrygd. Hann vísir á, at arbeitt verður við felags undirstøðukervi o.a., so at sleppast kann undan, at hvør stovnur í sínum lagi skipar sítt KT-øki, uttan at grundleggjandi trygdarviðurskifti eru í lagi og uttan at hava felags yvirskipað mál og mið. Til tess at náa málinum hevur Vinnumálaráðið sett á stovn eina KT-fyrisiting, ið tekur sær av felags undirstøðukervinum.

Í skrivinum vísir løgmaður til uppskot um yvirskipaða ætlan landsstýrisins “Visjón/endamál og strategi viðvíkjandi infrastrukturi og skipanum fyri felags KT-fyrisitingina” (**fylgiskjal 1**). Løgmaður heldur, at hetta skjalið helst verður endaliga evnað til og góðkent av ovastu stjórunum í miðfyrisitingini um miðjan november 2007. Síðani er ætlanin at leggja tað fyri landsstýrisfund til endaliga staðfesting.

Á fundi í oktober 2007 vísti Landsgrannskoðanin á, at ovasta politiska og fyrisitingarliga leiðslan hevur ikki meldað nóg greitt út um mál og ætlanir á KT-økinum. Harafturat vantar skikkað eftirlit og uppfylging. Til tað sigur løgmaður, at *“Løgmans-*

*skrivstovan tekur sjónarmið hjá Landsgrannskoðanini til eftirtektar og hevur munnliga heitt á Vinnumálaráðið um at leggja upp fyri hesum kritikki."*

Samanumtikið heldur løgmaður, at nógv er sett í verk til tess at fáa KT-økið á eitt nøktandi støði. Hinvegin ber ikki til at siga, nær komið verður á mál.

<u>Landsstýrismaðurin í vinnumálum vísir til strategipappír</u>

Landsstýrismaðurin í vinnumálum vísir eisini í sínum svarskrivi í oktober 2007 til skjalið um "Visjón/endamál og strategi viðvíkjandi infrastrukturi og skipanum fyri felags KT-fyrisitingina", sum umboð fyri nøkur aðalráð og nevndina fyri brúkararáðið fyri LandsNet hava orðað.

Í skrivinum vísir landsstýrismaðurin eisini á, at *"alt eftir, hvussu tað eydnast at skapa samstarv millum Ráðini, tá tað snýr seg um KT, fer tað at bera til at samskipa KT hjá tí almenna og harvið eisini KT-trygd"*.

<u>Viðmerkingar frá Landsgrannskoðanini</u>

Hóast skiftandi Landsstýri hava gjørt fleiri kanningar og frágreiðingar o.a. seinastu 20 árini, er ongin yvirskipaður KT-politikkur orðaður fyri landsumsitingina.

Tað, sum hevur eyðkent bygnaðin í landsumsitingini og skipanina av KT og KT-trygd, er, at krøv verða sett desentralt, avgerðir verða tiknar desentralt og lokal fyrilit verða tikin. Tilfeingið verður brúkt til at loysa desentralar uppgávur, og yvirskipað leiðsla og samskipan millum aðalráðini manglar.

Sambært skrivi løgmans frá oktober 2001 skuldi Vinnumálaráðið, við hjálp frá KT-forum, gera uppskot til almennan KT-politikk og KT-trygdarpolitikk.

Í oktober 2007 hevur Landsgrannskoðanin á fundi við Løgmansskrivstovuna og Vinnumálaráðið enn einaferð víst á týdningin at gera ein yvirskipaðan KT-politikk, sum er galdandi fyri alla almennu umsitingina, og at tað eisini koma klárar út-meldingar frá ovastu politisku og fyrisitingarligu leiðsluni um, hvørji mál Landsstýrið setir á KT-økinum, hvussu ætlanin er at røkka málunum, og hvat skal til fyri at røkka málunum.

Í umrødda strategipappíri (fylgiskjal 1) er arbeiðssetningurin *"At gera yvirskipaða visión/endamál og strategi viðvíkjandi infrastruktur og skipanum fyri felags KT-fyrisitingina"*

Skjalið lýsir ikki ein yvirskipaðan KT-politikk, sum er galdandi fyri alla landsfyri-sitingina. Heldur er talan um eina ætlan um, hvussu allir stovnar kunnu verða inn-limaðir í ein felags tøkniligan rakstrardepil.

Landsgrannskoðanin hevur áður víst á, at ein yvirskipaður KT-politikkur ikki kann verða gjørdur uttan samstundis at endurskoða almenna bygnaðin, við tí endamáli at effektivisera umsitingina, t.v.s. gera hana bíligari og betri.

Í einum uppriti frá KT-forum í oktober 2003, um KT-bygnaðin hjá landsfyri-sitingini, verður m.a. víst á, at neyðugt er at hugsa óheft av verandi bygnaði við ráðum og stovnum. Kommunurnar hava eina munandi útbygging av KT-kervinum fyri framman, og bæði landið og kommunurnar høvdu fingið nyttu av einum víðfevndum samstarvi, um tað byrjaði, áðrenn ferð rættiliga kom á hesa útbyggingina.

Vit kunnu eisini nevna, at eftir øllum at døma liggja eisini stórar íløgur fyri framman í sambandi við endurnýggjan av KT-skipanunum hjá Toll- og Skattstovu Føroya og teimum skipanum, sum eru knýttar at skattaskipanini. Sambært við-merkingunum í uppskotinum til fíggjarlóg 2008 verða rakstrarútreiðslurnar til KT-skipanirnar hjá Toll- og Skattstovu Føroya meira enn tvífaldaðar, tá ið bankarnir eftir ætlan um 2-3 ár taka í nýtslu nýggja KT-skipan, og Toll- og Skattstova Føroya verður einasti brúkari av verandi mainframe skipan hjá Elektron.

# 3 Reglur um kunningartrygd verða ikki hildnar

1. februar 2005 setti landsstýrismaðurin í vinnumálum í gildi rundskriv um KT-trygd. Sambært rundskrivinum hava stovnsleiðslurnar ábyrgdina av, at KT-trygdin, fyri 1. februar 2006, byggir á ISO 17799 standardin, at arbeiðið við KT-trygd skal verða skipað sambært BS 7799-2 standardinum, og at tær hava sett í verk teir partar av ISO 17799 trygdarstandardinum, sum stovnarnir sambært ítøkiligari váðameting skulu lúka.

Í 2006 spurdi Landsgrannskoðanin landsstýrismenn, hvørjir landsstovnar o.l., sum teir varðaðu av, luku tey krøv, ið eru ásett um KT-trygd. Flestu stovnar luku ikki krøvini.

<u>Áheitan frá løgtingsgrannskoðarunum í 2007</u>

Í uppskoti til samtyktar um at góðkenna landsroknskapin 2005, ið varð lagt fyri Løgtingið í januar 2007 (Lm. nr. 54-1/2006), høvdu løgtingsgrannskoðararnir hesar viðmerkingar um, at reglur um kunningartrygd verða ikki hildnar:

> *"Sambært rundskrivi frá Vinnumálaráðnum skuldu allir landsstovnar lúka altjóða KT-trygdarkrøv (ISO 17799) í seinasta lagi 1. februar 2006. Flestu stovnar lúka ikki ásettu trygdarkrøvini (s. 69-79), hvørki í rundskrivinum frá Vinnumálaráðnum ella í lógini og kunngerðini um trygd í sambandi við viðgerð av persónsupplýsingum. KT-trygdin á Almannastovuni er ikki nøktandi (s. 101-109), og langt er eftir á mál. Sama er galdandi fyri almanna- og heilsuøkið sum heild.*
>
> *Løgtingsgrannskoðararnir hava ávarað um, at skal hvør stovnur í sínum lagi lúka øll trygdarkrøvini, er vandi fyri, at kunningartøknin verður eitt haft um beinið á lands-umsitingini. Løgtingsgrannskoðararnir gjørdu tí vart við, at tað er bráðneyðugt at miðsavna og samskipa eina loysn á trupulleikunum.* ***Løgtingsgrannskoðararnir átala verandi støðu og ávara enn eina ferð um avleiðingarnar av, at ein loysn av trupulleikunum ikki verður samskipað.****"*

Vísandi til frágreiðingina frá Landsgrannskoðanini, og átaluna frá løgtingsgrann-skoðarunum, bað Landsgrannskoðanin í juli 2007 løgmann og landsstýrismannin í vinnumálum um viðmerkingar.

<u>Landsstýrismaðurin í vinnumálum vísir á, at tíðarfreistin er longd til 2010</u>

Í oktober 2007 hevur landsstýrismaðurin í vinnumálum kunnað um, at eitt dagført rundskriv um KT-trygd er sent út, sum m.a. setir eina longri tíðarfreist hjá stovnunum at lúka KT-trygdarkrøvini í ISO 17799 standardinum. Tíðarfreistin er longd frá 1. februar 2006 til 1. apríl 2010.

<u>Eitt KT-trygdarráð stovnað at orða yvirskipaðan KT-trygdarpolitikk</u>

Landsstýrismaðurin hevur eisini greitt frá, at í september 2007 varð eitt KT-trygdarráð stovnað, sum m.a. skal orða yvirskipaðan KT-trygdarpolitikk fyri landsfyrisitingina, skal styrkja tilvitanina um KT-trygd, bæði á leiðslu- og brúkarastøði og skal stuðla almennum stovnum at seta í verk ISO 17799 við t.d. at ráðgeva, gera skabelónir, fyriskipanir, best practices o.s.fr.

<u>Allir stovnar/aðalráð skulu innlimast í infrastruktur og skipanir hjá KT-fyrisitingini</u>

Landsstýrismaðurin kunnar um, at 21 stovnar og ráð eru limað inn í LandsNet við tilsamans um 500 arbeiðsstøðum. Harafturat eru nakrir stovnar og ráð, sum standa fyri at verða innlimað.

Í strategipappírinum stendur m.a, at "*strategiin er at innlima eftirverandi stovnar og aðalráð í infrastrukturin og skipanir hjá KT-fyrisitingini*".

LandsNet lýkur ikki krøvini um KT-trygd

Landsgrannskoðanin hevur áður víst á, at LandsNet lýkur ikki krøvini í rundskrivinum um KT-trygd. Sambært landsstýrismanninum vísir ein váðameting av LandsNet frá august 2007, at neyðugt er at leggja størri dent á trygdararbeiðið enn higartil. Umsitingarliga orkan fer tí í størri mun at verða brúkt til m.a. at gera trygdarmanna-gongdir.

Samanumtikið er niðurstøðan í váðametingini av LandsNet frá august 2007, sum eitt grannskoðanarvirki hevur gjørt: "*Havandi í huga ta ferð, sum LandsNet broytist við í løtuni, og at LandsNet ætlandi skjótt kemur at fata um mest sum allan almenna sektorin, er tað av alstórum týdningi, at trygdin verður raðfest høgt í allari tilgongdini og í gerandis-degnum annars. Vit meta, at størri dentur eigur at verða lagdur á trygdina enn higartil.*

*Okkara váðameting hevur varpað ljós á nakrar týðandi váðar, sum tørvur er á at byrgja upp fyri sum skjótast. Nakrir av hesum váðum eru eftir okkara áskoðan kritiskir. Harumframt er komið til sjóndar, at týðandi ábyrgdar- og ognarviðurskifti eru ógreið, og vit meta tað vera av alstórum týdningi, at støða verður tikin til hetta, og greiða fingin á hesum viðurskiftum.*"

Tá ið LandsNet ikki megnar at lúka krøvini í rundskrivinum um KT-trygd, kann tað verða sera torført hjá restini av umsitingini at lúka krøvini.

Viðmerkinar frá Landsgrannskoðanini

Tað eru helst fleiri orsøkir til, at stovnar ikki lúka krøvini um KT-trygd, m.a.:

- ov lítil tilvitan og fatan av KT-trygd,
- ongin yvirskipaður KT-politikkur og KT-trygdarpolitikkur er orðaður,
- KT verður stýrt miðfirrað,
- krøv verða sett, uttan at veita vegleiðing ella stýringaramboð,
- tilmælini frá KT-Forum um útbúgving og førleikamenning, samstarv tvørtur um aðalráð, pilotverkætlanir, 5 ára freist og at broyta KT-bygnaðin, vórðu ikki fylgd, og
- vantandi umsjón/eftirlit.

Í juni 2007 sendi Vinnumálaráðið út eitt dagført rundskriv, har tíðarfreistin varð longd frá 1. februar 2006 til 1. apríl 2010. Landsgrannskoðanin heldur, at tað vísir, hvussu høpisleyst tað var at senda upprunaliga rundskrivið út við einari tíðarfreist uppá 1 ár. Vit kunnu eisini vísa á, at KT-trygdin ikki í sjálvum sær verður betri av, at freistin verður útsett.

Í hjáløgdu ritgerð (fylgiskjal 3) vísa høvundarnir á, at rundskrivið um KT-trygd er sett í gildi í einum bygnaði, sum vantar flestu fyritreytir fyri einari skipaðari tilgongd til arbeiðið við KT-trygd, og teir halda rundskrivið frá 2004 vera eitt tómt skal, sum ikki tryggjar eina nøktandi KT-trygd í landsumsitingini.

KT-bygnaðurin er sum so heldur ikki broyttur, men ein nýggj deild – KT-fyrisitingin – er sett á stovn í Vinnumálaráðnum. Samstarvið um at seta í verk reglu-verkið er ikki framt. Vinnumálaráðið hevur ístaðin valt, at KT-fyrisitingin skal taka sær av kunningartøkniligari samskipan í landsfyrisitingini sum heild. Harafturat hevur Vinnumálaráðið stovnað ein felags tøkniligan KT-depil – LandsNet – sum KT-fyrisitingin rekur.

Okkum kunnugt, hevur tað ikki verið skipað fyri útbúgving ella førleikamenning.

# 4 Vantandi yvirskipað eftirlit

Í september 2006 spurdu vit eisini avvarðandi landsstýrismenn/aðalráð, hvussu tey høvdu eftirlit/umsjón við, at stovnarnir luku ásetingarnar í rundskrivinum um KT-trygd, sum allar skuldu verða loknar 1. februar 2006.

Eftir svarunum at døma er onki skipað eftirlit við, um stovnarnir lúka krøvini í rundskrivinum ella í lóg/kunngerð um viðgerð av persónsupplýsingum. Tað tykist eisini vera sera misjavnt, hvussu landsstýrismenn fata leiklut sín á hesum øki. Ein stórur vandi liggur í, at stovnsleiðarar ofta fata spurningar um KT-trygd sum tekniskar trupulleikar, ið serfrøðingar skulu taka sær av. Ein uppaftur størri vandi liggur í, at fleiri aðalráð og landsstýrismenn tykjast hava somu fatan.

Ásetingar um eftirlit

Fleiri ásetingar eru um eftirlit, sum landsstýrismenn/aðalráð skulu hava við stovnum á teirra málsøki.

Sambært stýrisskipanarlógini hava løgmaður og landsstýrismenn rættarliga ábyrgd av fyrisitingini av teim málsøkjum, sum løgd eru til teirra

Sambært fráboðanini um býti av málsøkjum hevur ein landsstýrismaður yvirskipaða eftirlitið við stovnunum á sínum málsøki, og hevur heimild at geva teimum tænastuboð. Sambært løgmanni skal hvør landsstýrismaður taka stig til og tryggja, at teirra skipanir liggja innan fyri karmarnar um KT-trygd, sum verða ásettir av Vinnumálaráðnum.

Sambært lógini um ábyrgd landsstýrisins kann løgmaður ella landsstýrismaður verða revsaður, skúgvar hann tilætlað ella av grovum ósketni til viks tær skyldur, sum liggja á honum. Hann kann eisini *"verða mettur at hava medvirkað til gerðina hjá einum undirmanni, tá hann, við ikki í rímiligan mun at hava ført eftirlit og ásett reglur, hevur virkað fyri, at gerðin er vorðin framd."*

Áheitan frá løgtingsgrannskoðarunum í 2007

Í seinasta uppskoti til samtyktar um at góðkenna landsroknskapin 2005 (Lm. nr. 54-1/2006), ið løgtingsgrannskoðararnir løgdu fyri Løgtingið 31. januar 2007, varð mælt til, at løgmaður tekur henda spurning til viðgerðar:

> *"Í frágreiðingum frá Landsgrannskoðanini og í uppskotum til samtyktar frá løgtingsgrannskoðarunum sæst, at seinastu mongu árini eru nógv mál umrødd í áravís, uttan at nakað ítøkiligt hendir. Løgtingsgrannskoðararnir hava fleiri ferðir átalað, at so nógv ár ganga, uttan at mál verða loyst. Tað áliggur landsstýrismonnum at hava yvirskipað eftirlit við fyrisitingini av teimum málsøkjum, teir varða av, og tað áliggur løgtingsgrannskoðarunum m.a. at ansa eftir, at landsstýrismenn røkja sínar skyldur. Vísandi til s. 78 tykist henda eftirlitsuppgáva ikki vera skipað á mongum økjum, og* ***løgtingsgrannskoðararnir vilja mæla til, at løgmaður tekur henda spurning til viðgerðar****."*

Vísandi til frágreiðingina frá Landsgrannskoðanini, og tilmælið frá løgtingsgrannskoðarunum, bað Landsgrannskoðanin í juli 2007 løgmann og landsstýrismannin í vinnumálum um viðmerkingar.

Løgmaður vísir til landsstýrismannin í vinnumálum

Løgmaður vísir á, at landsstýrismaðurin í vinnumálum hevur yvirskipaðu ábyrgdina á KT-økinum í almennu fyrisitingini. Hann vísir á, at sambært lýsingini í fráboðan løgmans um ábyrgdarbýti stendur, at *"Landsstýrismaðurin útvegar undirstøðukervi, felags nýtsluskipanir og standardforrit, sum fyrisitingarligar eindir hjá landinum kunnu fáa atgongd til. Tá stovnur fær atgongd til felags undirstøðukervið o.t., tekur landsstýrismaðurin á seg*

*ábyrgd viðvíkjandi trygd av felags skipanunum. Harafturat hevur landsstýrismaðurin eftir somu fráboðan heimild til "at geva fyrisitingarligu eindunum boð um 1) KT – nýtslu og trygd, 2) Ný- og umbygging 3) Viðlíkahald, 4) Leigumál og keyp av fastogn, 5) Viðgerð av studningsmálum viðvíkjandi fastogn 6) Nýtslu av byggiráðgeving."*

Løgmaður sigur, at eftir hesum er tað ávísur myndugleiki, nevniliga Vinnumálaráðið, ið hevur yvirskipaðu ábyrgdina av at stjórna kunningartøkni og trygd.

Viðmerkingar frá Landsgrannskoðanini

Í seinastu frágreiðing vísti Landsgrannskoðanin á, at tað var neyðugt hjá løgmanni at leggja áherðslu á tað eftirlit, ið hvør landsstýrismaður/aðalráð eigur at hava við stovnum á sínum málsøki, herímillum um stovnarnir lúka ásetingarnar um KT-trygd, tað veri sambært rundskrivinum frá Vinnumálaráðnum, ella sambært lógini og kunngerðini um trygd í sambandi við viðgerð av persónsupplýsingum. Á roknskaparliga økinum er tað yvirskipaða eftirlitið formaliserað við, at undirliggjandi stovnar, hvønn mánað mótvegis landsstýrismanninum/aðalráðnum, vátta á einum serstøkum oyðiblaði (EK 76), at roknskaparligu viðurskiftini eru í lagi. Men tað eru so mong onnur øki, eitt nú KT, har yvirskipaða eftirlitið als ikki er skipað.

Hjálagda ritgerð vísir á, at løgmaður átti at tikið á seg ábyrgd av at ganga undan. Løgmaður er ovasta leiðsla hjá landsumsitingini. Tað er hansara ábyrgd at býta málsøkini millum landsstýrismenninar, og sambært stýrisskipanarlógini skal hann hava eftirlit við, at hvør einstakur landsstýrismaður situr fyri sínum málsøki á lógligan og fullgóðan hátt.

# 5 Ávís framstig eru hend

## 5.1 Stjórnan av kunningartøkni (KT-politikkur)

Sum víst á í ritgerðini (fylgiskjal 3), hava skiftandi Landsstýri í 20 ár roynt at taka stig til at orða ein yvirskipaðan KT-politikk fyri landsumsitingina, men enn er hann ikki orðaður.

Eitt KT-trygdarráð er stovnað, sum m.a. skal orða yvirskipaðan KT-trygdarpolitikk fyri landsfyrisitingina, skal styrkja tilvitanina um KT-trygd, bæði á leiðslu- og brúkarastøði og skal stuðla almennum stovnum at seta í verk ISO 17799 við t.d. at ráðgeva, gera skabelónir, fyriskipanir, best practices o.s.fr.

Eitt uppskot til eina yvirskipaða ætlan er gjørt í strategipappírinum: "Visjón/endamál og strategi viðvíkjandi infrastrukturi og skipanum fyri felags KT-fyrisitingina". Uppskotið er ein ætlan viðvíkjandi infrastrukturi og skipanum fyri KT-fyrisitingina.

Landsgrannskoðanin heldur, at skal landsumsitingin í størri mun gagnnýta stóru møguleikarnar fyri at digitalisera og rationalisera umsitingina, er eisini neyðugt, at leggja meira yvirskipaðar ætlanir, enn strategipappírið leggur upp til. Í hesum sambandi er neyðugt at endurskoða bygnaðin, lóggávuna, uppgávubýtið millum land og kommunur, millum aðalráð og stovnar o.o.

Hjálagda ritgerð mælir frá at gera fleiri kanningar ella frágreiðingar fyri at orða KT-strategi og KT-trygdarstrategi, um politiska og umsitingarliga ovasta leiðslan ikki hevur tikið eina avgerð at fremja neyðugu broytingarnar, herímillum eisini bygnaðarbroytingar, lógarbroytingar o.a., fyri at ætlanirnar skulu verða meira og annað enn føgur orð.

## 5.2 Stjórnan av kunningartrygd

Ein felags KT-fyrisiting undir Vinnumálaráðnum loysir í dag nakrar av teimum uppgávum, ið stovnar hvør sær áður skuldu loysa.

Ein KT-trygdarleiðari er settur í Vinnumálaráðnum, sum skal hava yvirskipað eftirlit við, at kunningartrygdin er samsvarandi trygdarpolitikki og leiðreglum fyri KT-trygd, sum Vinnumálaráðið á leiðslustigi hevur samtykt. Harafturat hevur eitt grannskoðaravirki gjørt eina váðameting av LandsNet.

Ritgerðin vísir á nakrar grundleggjandi fyritreytir (succesfaktorer), sum skulu til, fyri at stjórnan av kunningartrygd skal eydnast:

1. Ovasta leiðslan má leggja eina yvirskipaða KT-ætlan, herímillum:
   - orða trygdarpolitik
   - vísa sjónligan stuðul og áhuga
   - vísa forstáilsi fyri tørvinum á KT-trygd
   - tryggja neyðug tilfeingi (manning, tíð og pening)

2. Ovasta leiðslan má tryggja neyðugar bygnaðarligar karmar, herímillum skrivliga lýsa bygnað, ábyrgdarbýti, mannagongdir o.s.fr.

3. Ovasta leiðslan má tryggja, at fyrisitingin er tilvitað um týdningin av KT-trygd, herímillum:
   - kunna bæði leiðslu og starvsfólk um KT-trygd
   - gera og senda út vegleiðingar, mannagongdir, fyriskipanir o.s.fr.

- tryggja nøktandi tilvitan (awareness) og neyðuga útbúgving og førleikamenning

4. Ovasta leiðslan má tryggja umsjón (yvirskipað eftirlit), herímillum tryggja, at stýringin av KT-trygd verður eftirmett við atliti at neyðugum batum ella broytingum

Landsgrannskoðanin mælir løgmanni og landsstýrismanninum í vinnumálum til at hava frammanfyri nevndu fyritreytir í huga, í sambandi við framhaldandi arbeiði teirra at stjórna kunningartøkni og kunningartrygd.

Politiska og umsitingarliga leiðslan í Vinnumálaráðnum og á Løgmansskrivstovuni hava ein serligan tørv at ásanna, at stjórnan av KT-trygd er ábyrgdin hjá ovastu leiðsluni. Stjórnan av KT og KT-trygd eru ikki tekniskir spurningar, sum kunnu verða latnir einari KT-fyrisiting at loysa.

# 6 Fylgiskjal 1: Visjón/endamál & strategi viðv. infrastruktur & skipanum fyri felags kt-fyrisitingina

**VINNUMÁLARÁÐIÐ - *ARBEIÐSBÓLKURIN***

---

VISJÓN/ENDAMÁL & STRATEGI

VIÐV. INFRASTRUKTUR & SKIPANUM

FYRI FELAGS KT-FYRISITINGINA

---

ÚTGÁVA 1.1

# 7 Fylgiskjal 2. Brot úr ársfrágreiðing latin løgtingsgrannskoðarunum 12. januar 2007

14 síður við hesari skíðuni

# 8 Fylgiskjal 3: Høvuðsuppgáva um grannskoðan av stjórnan av KT-trygd í føroysku landsumsitingini

**Cand.merc.aud. –studiet**
**Institut for Regnskab og Revision**

# Kandidatafhandling

# Revision af styringen af IT-sikkerhed i den færøske landsadministration

Brynleif Poulsen

Beinta Dam

**Vejleder:**

Kurt Keldebæk Rasmussen

**Aflevering 12. juni 2007**
Handelshøjskolen i København 2007